# Torkils døtur



## Undirvísingargongd til byrjanardeild

## Lærarvegleiðing

Høvundar: Elin Maria Óladóttir Olsen og Sigurlaug Fossdal

## Endamál

Undirvísingargongdirnar eru skipaðar soleiðis, at allir næmingarnir læra eina samlaða kvæðaheild. Hetta so at næmingarnir fáa samanhangandi undirvísing í kvæðum gjøgnum alla skúlagongdina, soleiðis, at teir á hvørjum ári kunnu taka afturíaftur tey kvæði, sum teir hava lært árini frammanundan, og harvið kann dansurin ganga smidligari.

Afturat hesum eru vísur, ið verða tiknar upp á hvørjum ári, umframt at aðrir barnasangir kunnu nýtast at læra stevið.

Eisini mæla vit til at byrjað verður at læra dansispøl longu í grunddeildini.

Við hesi undirvísingargondini eru samstundis nøkur spøl, sum kunnu nýtast at læra kvæðini uttanat.

### Vísur at taka upp á hvørjum ári

- Øskudólgur & sópingarkonan
- Kall og Svein ungi
- Veturin kom
- Burtur á heiði
- Telja jólini
- Korn på sorn
- Kráka situr á steini
- Nú liggur ein kavafonn tindi á
- Eg kendi mær ein ríkmann

## Byrjanardeild

- Nykursvísa
- Torkils døtur
- Ólavur Riddararós

### Dansispøl

- Ríða ediling
- Seman seman nemar
- Dansa í ringi
- Bandadansur
- Gamlaketa
- Sandoyardansur

## Miðdeild

- Brestiskvæði
- Sigmundskvæði yngra
- Leivur Øssursson
- Stolt Signhild

## Hádeild

- Ormurin Langi
- Flóvin Bænadiktsson
- Uppskot til eyka (Havnargentan kvøður)

### Sangir, ið kunnu brúkast at læra stevið

- Omma Ludvík
- Andras Dunna
- Góðan morgun ketta mín
- Buss-Óli
- Grønir menn frá Pluto
- Hvør er hasin, ið situr har?

**Í undirvísingini í føroyskum dansi eiga hesi evni at vera nomin við:**

- Hvat er føroyskur dansur?
- Stev
- Læra kvæði uttanat
- At brúka allan kroppin at dansa við
- Hvat merkir tað at skipa?
- Hyggja í eyguni hvør á øðrum
- Munurin á at syngja og kvøða

Tað hevur stóran týdning, at hetta ikki einans er uttanatlæra, men hevur eitt endamál, og at tað er **stuttligt.**

# Torkils døtur

1. Torkil eigur sær døtur tvær,
*– at dansa –*
leingi á morgni sova tær.
*– Væl er mær ansað,*
*har vil eg á gólvið fram at dansa,*
*hóast tú vilt* mær *lív í vá,*
*og væl er mær ansað.*

2. Tær sova sær so leingi,
sólin skínur seingir.

3. Tær sova sær so leingi á dag,
til sólin skínur á seingjarstað.

4. Torkil gongur til búðar,
vekir upp døtur prúðar.

5. "Statt upp, Katrin, dóttir mín,
kirkjumaður bíðar tín."

6. Katrin setst á seingir,
klæðist væl og leingi.

7. Hon fór í ein silkiserk,
níggju moyggja handaverk.

8. Uttanyvir møttulin blá,
gull eftir hvørjum seymi lá.

9. Katrin setst á seingjarstokk,
hon fór í ein skarlakssokk.

10. Skarlakssokk við búgvin skó,
hvítar hendur við herðar tvó.

11. Hon tók til sín góða gullkamb,
kembdi sítt hár, við silkiband.

12. Hon kembir sítt hár, við silki smá,
gullkrúnu setir hon omaná.

13. Katrin gongur í rossahús,
loysir hon tann gangara út.

14. Hon loysir út ein, hon loysir út tvá,
tann besta legði hon saðilin á.

15. Har var eingin knektur hjá,
sjálv legði Katrin bokslið á.

16. Har var eingin knektur í lund,
sjálv legði Katrin bokslið í munn.

17. Katrin reið gøtuni fram,
tað glymdi, sum hennara gangari rann.

18. Tá ið hon kom har suður í líð,
møttu henni vallarar 'trý'.

19. Tá ið hon kom har skamt ífrá,
møttu henni vallarar tvá.

20. Tá ið hon kom har mitt á leið,
møtti henni vallari ein.

21. "Hoyr tú, Katrin, eg tali til tín,
vilt tú vera mítt kvøldarvív?"

22. "Fyrr vil eg láta mítt unga lív,
enn eg vil vera títt kvøldarvív."

23. "Hvat vilt tú láta títt unga lív,
heldur enn vera mítt kvøldarvív?"

24. Vallarin sínum svørði brá,
hann hjó Katrina í lutir tvá.

25. Har sum hennara blóðið dreiv,
tendraðist ljós á hvørji leið.

26. Har sum hennara høvdið lá,
sprakk ein kelda við heilivág.

27. Har sum hennara bulurin lá,
reistist ein kirkja við krossi á.

28. Vallarin heim í garðin fór,
úti Torkil, fyri honum stóð.

29. "Hoyr tú, vallari, eg tali til tín,
sást tú Katrin, dóttur mín?"

30. "Jú so menn, eg hana sá,
í Mariukirkju var hon í gjár.

31. Torkil, Torkil, læna mær hús,
eg eri mær so sára sjúk!"

32. "Húsini eru til reiðar,
um vallararnir vóru fleiri.

34. Ása gongur til seingjar,
reiðir undir sjúkum dreingi.

35. "Ása lítla, sov hjá mær,
silkiserkin gevi eg tær!"

36. "Lat meg fyrst serkin sjá,
síðan skal eg tær sova hjá."

37. Tað fyrsta hon tann serkin sá,
systurmerkið kendi hon á.

38. "Ása lítla, sova hjá mær,
møttulin bláan gevi eg tær."

39. "Lat meg fyrst tann møttulin sjá,
síðan skal eg tær sova hjá."

40. Tað fyrsta hon tann møttulin sá,
systurmerkið kendi hon á.

41. "Ása lítla, sov hjá mær,
eina gullkrúnu gevi eg tær."

42. "Lat meg fyrst gullkrúnu sjá,
síðan skal eg tær sova hjá."

43. Tað fyrsta hon ta gullkrúnu sá,
systurmerkið kendi hon á.

44. Ása smeldi hurð í gátt:
"Vallari, hav nú góða nátt."

45. Ása gongur for faðir sín:
"Vallarin hevur dripið dóttur tín."

46. "Hvør torir mær tey boð at bera,
ella hvør tordi tann gerning at gera?"

47. "Eg tori tær tey boð at bera,
vallarin tordi tann gerning at gera."

48. Torkil heitir á sveinar tvá:
"Gangið á skóg og kyndið bál.

49. Gangið á skóg og kyndið bál,
har skal vallarin brenna á."

50. Tað var um eina morgun tíð,
vallarin brann í grønari líð.

51. Tað var um eina morgun stund,
vallarin brann í grønari lund.

*Uppskrivað eftir upptøku hjá Tøkum Lætt - (2000): Føroyskur Dansur Fyri Øll, Tutl*
*www.youtube.com/watch?v=dJh63W6L17U&ab_channel=T%C3%B8kumL%C3%A6tt-Topic*

# 1. tími

## Áðrenn farið verður í holt við at læra kvæðið.

Tosað verður um, hvat kvøðing og føroyskur dansur er.

Her kann verða tosað um:

- Hvat var undirhald áðrenn telefon, telda, sjónvarp, útvarp o.s.fr.
  - Frásøga í kvæðum
- Hvat er føroyskur dansur?
- Munur er á dansi og kvæðum frá bygd til bygd,
  tí søguliga var sambandið ikki so gott

### Næmingarnir fáa kvæðið handað

Lærarin lesur ella kvøður fyri næmingunum. Lærarin greiðir síðani frá søgugongdini, samstundis sum hann teknar hana upp á talvuna. Tað snýr seg ikki um, hvussu vakurt tað er teknað, men tað ber eisini til at nýta myndir á slides, um hetta fellur lærarunum lættari. Ein annar møguleiki er at nýta bókina "*Torkils døtur*" (2013) eftir Sólrún Michelsen.

### Tekna kvæðið

Nú kunnu næmingarnir fáa eitt ørindi hvør at tekna. Summi kunnu fáa tvey ørindi at tekna, um tey eru tíðliga liðug. Umráðandi er, at øll ørindini eru við. Tekningarnar verða hongdar á veggin, tá ið tær eru lidnar. Hesar skulu brúkast til *kvæðastafett*, sum kemur seinni í undirvísingargongdini.

### Skúlating

Næmingarnir læra seg fyrstu 3 ørindini uttanat heima.

# 2. tími

## Taka afturíaftur

Tosa við næmingarnar um, hvat teir lærdu seinast. Eisini verður kannað, um teir hava lært seg uttanat. Hetta kann gerast einsæris millum næmingarnar, ella øll siga í felag. Eisini er eitt gott hugskot at kvøða tey trý ørindini sitandi.

## Dansa føroyskan dans

Nú kunnu vit dansa føroyskan dans. Næmingarnir læra stevið, og hvussu vit halda í hondina, hvør á øðrum. Gott hugskot er at byrja við einum barnasangi, so stevið kemur í rættlag. Síðani (verður kvøðið) verða kvøðin? tey trý ørindini, sum næmingarnir hava lært – Kanska eisini tey næstu trý, sum næmingarnir fáa fyri heima til næstu ferð. At enda kunnu tit kvøða ein annan barnasang – t.d. kráka situr á steini, til øll hava vent sær í ringi.

## Læra raðfylgjuna í kvæðinum – spæl: Kvæðastafett

Nú skulu tekningarnar frá seinasta tíma brúkast aftur. Tær verða lagdar hultur til bultur á gólvið í gongini. Nú skulu næmingarnir kappast. Býtt verður í tvey lið. Annað liðið fer inn í skúlastovuna at læra seg ørindi 4-6, meðan hitt liðið skal leggja myndirnar í rætta raðfylgju. Øll samstarva um at leggja myndirnar, og lærarin tekur tíð. Tá næmingarnir eru lidnir at leggja, kannar lærarin (eftir), um alt er rætt. Liggur ein mynd skeivt, telur hon eitt minusstig.

Nú skifta liðini um. Tað liðið, sum hevði flest rætt og kláraði at leggja alt uppá stytst tíð, hevur vunnið.

## Skúlating

Næmingarnir læra seg ørindi 4-6 uttanat heima.

# 3. tími

## Taka afturíaftur

Tosa við næmingarnar um, hvat teir lærdu seinast. Eisini verður kannað, um teir hava lært seg uttanat. Hetta kann gerast einsæris millum næmingarnar, ella øll siga í felag. Eisini er eitt gott hugskot at kvøða sitandi.

## Ymiskir dansihættir

Nú verður gjørt eitt sindur burturúr ymiskum dansihættum. Dansað verður til ymiskar barnasangir, næmingarnir duga, umframt tað kvæðið, næmingarnir eru í ferð við at læra seg.

Lærarin ger av, hvat næmingarnir royna. Tað kann t.d. vera:

- Hyggja í eyguni á hinum í ringinum og smílast til teirra
- Kvøða spakuliga og hart (royna ymsar 'volumir')
- Kvøða seint og títt (eisini ber til at brúka 'pílin') sí *fylgiskjal 3*
- Hava stórar og smáar rørslur

## Spurnarkapping

At enda kann lærarin hava spurnarkapping við næmingunum. Tað ber til at nýta *fylgiskjal 1*, ella lærarin finnur upp á spurningarnar sjálvur. Spurningarnir kunnu vera um føroyska dansin, Torkils døtur og/ella hinar sangirnar, ið vóru brúktir í tímanum. Harumframt kunnu spurningar nýtast um kvæði, næmingarnir hava lært árini frammanundan.

## Skúlating

Næmingarnir læra seg ørindi 7-9 uttanat heima.

# 4. tími

## Taka afturíaftur
Tosa við næmingarnar um hvat teir lærdu seinast. Eisini verður kannað, um teir hava lært seg uttanat. Hetta kann gerast einsæris millum næmingarnar, ella øll siga í felag. Eisini er eitt gott hugskot at kvøða sitandi.

## At skipa
Tikið verður afturíaftur at kvøðing er ein frásøguháttur. Men hvør sigur søguna? Jú tað er skiparin.

Greitt verður frá, at skiparin altíð byrjar ørindið, og hini koma ikki uppí, fyrr enn eitt sindur inni í ørindinum. Eisini er tað skiparin, ið ger av ferðina í kvøðingini, so eingin eigur at yvirhála henda.

Vel ein í flokkinum, ið kann skipa Torkils døtur. – Eisini er gott at velja ein hjálpara, sum skiparin skal hava í vinstru hond.

Nú verður dansað við skipara úr flokkinum. Eisini kunnu dansast aðrir sangir, sum næmingarnir duga frammanundan.

## Skaldskapur á mannamunni
Næmingarnir seta seg í ein ring á gólvið. Lærarin tekur ein næming út í gongina og lærir hann 10. ørindi í Torkils døtur.

Næmingurin kemur innaftur, setur seg í ringin og teskar ørindið í oyrað á tí, ið situr við síðuna av. Soleiðis teska tey, til ørindið er komið allan vegin runt. Tann síðsti, ið hoyrir ørindið, sigur tað hart. Tað eigur helst at vera broytt nú. Út frá hesum kann lærarin greiða frá, hvussu framúr góð kvæðini vóru egnað til at varðveita føroyska søgu.

Hetta spælið kann eisini tillagast sum eitt rennispæl, har næmingarnir eru staðsettir í eina raðfylgju við stórari frástøðu. Síðani skal tann fyrsti renna til tann næsta og siga ørindið. Tann næsti rennur víðari til tann triðja, o.s.fr. – Í hesum sambandi er viðkomandi at tosa um, hvussu man bar boð fyrr í tíðini, áðrenn telefonir og teldupost.

## Skúlating
Næmingarnir læra seg ørindi 10-12 uttanat heima.

# 5. tími

## Taka afturíaftur

Tosa við næmingarnar um, hvat teir lærdu seinast. Eisini verður kannað, um teir hava lært seg uttanat. Hetta kann gerast einsæris millum næmingarnar, ella øll siga í felag. Eisini er eitt gott hugskot at kvøða sitandi.

## Føroyskur dansur

Tikið verður afturíafttur ymiskar dansihættir. Lærarin greiðir frá, hvussu vit eiga at dansa – fjaðran í knøunum, hendurnar hanga ikki og darla, og vit hava rútmu í kroppinum.

Nú verður aftur dansað á ymiskan hát. Tað kann t.d. vera:

- Hyggja í eyguni á hinum í ringinum og smílast til teirra
- Kvøða spakuliga og hart (royna ymsar 'volumir')
- Kvøða seint og títt (eisini ber til at brúka 'pílin') sí *fylgiskjal 3*
- Hava stórar og smáar rørslur

Eftir dansin verður tosað um, hvat næmingarnir hildu riggaði best. Hvat var stuttligast, vakrast, rotnast, rættast.... o.s.fr.

## Borðspæl

Næmingarnir spæla eitt borðspæl um kvæðið. Sí *fylgiskjal 2*.

## Skúlating

Næmingarnir læra seg ørindi 13-14 uttanat heima.

# 6. tími

## Taka afturíaftur

Tosa við næmingarnar um, hvat teir lærdu seinast. Eisini verður kannað, um teir hava lært seg uttanat. Hetta kann gerast einsæris millum næmingarnar, ella øll siga í felag. Eisini er eitt gott hugskot at kvøða sitandi.

## Spæl við tekningunum

Nú taka vit afturíaftur tekningarnar, sum vórðu teknaðar í byrjanini. Næmingarnir fáa eina tekning í part (eru fleiri næmingar enn ørindi, kunnu tveir næmingar deilast um eina tekning). Nú skulu næmingarnir stilla seg í raðfylgju eftir tekningunum, ør. 1-14. Næmingarnir hava ikki loyvi at siga nakað, men skulu samstarva uttan orð. Tá næmingarnir standa rætt, taka teir saman og fara at kvøða. **Næmingarnir skiftast um at skipa, soleiðis, at hvør næmingur skipar tað** ørindi**, sum tekningin vísir.**

## At enda:

At enda verður tikið afturíaftur og tosað um:

- Hvat snýr hetta kvæðið seg um?
- Hvat er tað at skipa?
- Hvat er góður føroyskur dansur?

# Kvæði sum fyrisøgn

Kvæði kunnu eisini nýtast sum fyrisøgn.

Lærarin velur tey orðini, næmingarnir skulu skriva í fyrisøgnini, og undirstrikar tey. Næmingarnir lesa uppá heima og fáa eina útfyllingarfyrisøgn at skriva, ella lærarin velur at skriva alla fyrisøgnina, ið næmingarnir fyrireika heima.

- Fyrisøgnin kann skrivast **bak** ímóti **baki**, har næmingarnir ikki skriva tey somu orðini. Næmingarnir standa bak ímóti baki. Næmingur 1 lesur ein setning, meðan næmingur 2 skrivar og øvugt. Soleiðis skiftast teir um.
- Tað kann verða ein **rennifyrisøgn**, har lærarin hevur hongt ørindini upp í skúlagarðinum ella í høllini/gongini, og næmingurin rennur út, lesur eitt ørindi, rennur inn aftur til pappírið og skrivar.
- Tað kann vera ein **samstarvs-rennifyrisøgn** har næmingarnir verða greipaðir í pør. Lærarin heingir ørindini runt í skúlagarðin/høllina. Annar næmingurin rennur til eitt ørindi, lesur, roynir at minnast tað, og rennur síðani aftur til makkaran, ið skrivar tað niður. Minnist næmingurin ikki alt ørindið, má hann renna enn einaferð. Tá eitt heilt ørindi er skrivað, skifta teir um.
- Ein **vanlig fyrisøgn**, har lærarin lesur upp, og næmingarnir skriva.
- Ella okkurt heilt annað, sum tær dámar væl at brúka.

Tað er lætt at tillaga fyrisøgnina, tí tú velur sjálv/ur hvørji orð, tú metir næmingarnar vera førar fyri at skriva. Dømi um fyrisagnir eru í *fylgiskjali 5.*

# Fylgiskjal 1 – Spurnarkapping

Spurnarkappingin kann gerast sum tú sjálv/ur ynskir, ella tú kanst nýta hugskotið niðanfyri.

Vit nýta samstarvslæru.

Næmingarnir eru býttir í bólkar á 3. Næmingarnir í hvørjum bólki skulu hava hvør sítt tal frá 1-3. Lærarin setur spurningin. Næmingarnir tosa saman í bólkunum, og verða samdir um, hvat svarið er. Lærarin sigur eitt tal. Allir næmingar við tí talinum (t.v.s. 1 næmingur úr hvørjum bólki) reisa seg, og skulu siga hart, hvat teirra bólkur hevur svarað. Var svarið rætt, fær bólkurin 1 stig. Var svarið skeivt, fær bólkurin einki stig.

1. Tá ið vit dansa føroyskan dans, hvør hond er omaná?
2. Tá ið vit dansa føroyskan dans fara vit tvey fet til…?
3. Hvussu nógvar døtur átti Torkil?
4. Hvussu itu tær?
5. Hvør teirra skuldi giftast?
6. Hvussu sá møttulin hjá Katrini út?
7. Hvussu nógvum vallarum møtti Katrin?
8. Hvat gjørdi vallarin við Katrina?
9. Hvat hendi har, sum bulur Katrinar lá?
10. Hvar fór vallarin so?
11. Hvør fann út av, at vallarin hevði dripið Katrina?
12. Hvat gjørdi Torkil við vallaran?

# Spurnarkapping

| | |
|---|---|
| 1 | |
| 2 | |
| 3 | |
| 4 | |
| 5 | |
| 6 | |
| 7 | |
| 8 | |
| 9 | |
| 10 | |
| 11 | |
| 12 | |

**Bólkur** ______________________________

# Fylgiskjal 2 – Kvæða-quiz




## Soleiðis spælir tú.

2-4 spælarar eru í hvørjum bólki.

Næmingarnir kunnu gera spurningar sjálvir, ella tit kunnu brúka spurningarnar, ið eru lagdir við. Gera næmingarnir spurningarnar sjálvir, ger bólkur 1 spurningar til bólk 2, bólkur 2 til bólk 3 o.s.fr.

Næmingarnir hava allir ein brikk í part, og øll byrja hjá skiparanum.

Tað snýr seg um at vera fyrstur frá skiparanum til endan, og vit dansa øll til vinstru. Næmingurin ringlar og flytur, men fyri at sleppa at flyta, skal hann svara einum spurningi rætt. Svarar hann skeivt, verður hann verandi í stað.

Lendir næmingurin á "Dansa í ringi" og megnar at svara spurninginum rætt, sleppur hann at ringla umaftur. Svarar hann skeivt, skal hann aftur har, sum hann stóð frammanundan.

Lendir næmingurin á "Skift pláss" (frameftir) sleppur hann hagar, sum pílurin vísir, um hann svarar spurninginum rætt. Lendir næmingurin harafturímóti á "skift pláss" (aftureftir), skal næmingurin beinleiðis aftur har, sum pílurin peikar. Svarar hann rætt, sleppur hann at standa har, sum pílurin vísir. Svarar hann skeivt, skal hann bakka líka nógv eygu, sum hann fekk.

### Tú skalt brúka:

- 1 Kvæða-quiz bretti hvønn bólk
- Lepar at skriva spurningar á
- 1 terning til hvønn bólk
- Brikkar til næmingarnar at flyta

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hvussu sær Omma Ludvík út?<br>*Stór og sterk* | Hvør hond er omaná, tá ið vit dansa føroyskan dans?<br>*Høgra* | Hvussu nógv fet taka vit til vinstru, tá ið vit dansa føroyskan dans?<br>*2 fet* | Hvussu nógv fet taka vit til høgru, tá ið vit dansa føroyskan dans?<br>*1 fet* |
| Hvussu eita genturnar í Torkils døtur?<br>*Katrin og Ása* | Hvat gjørdu Torkils døtur so leingi?<br>*Svóvu* | Hvat setti Katrin á høvdið?<br>Gullkrúnu | Hvat læt Katrin seg í?<br>*Ein silkiserk* |
| Hvør setti bokslið í munnin á hestinum?<br>*Katrin* | Hvussu nógvum vallarum møtti Katrin suðuri í líð?<br>*Trimum* | Hvat vildi vallarin Katrini?<br>*Sova hjá henni* | Hvat segði Katrin, tá ið vallarin vildi sova hjá henni?<br>*At hon vildi heldur doyggja* |
| Hvar svav vallarin um náttina?<br>*Hjá Torkili* | Hví vildi vallarin sova hjá Torkili?<br>*Hann var so sjúkur* | Hvør skuldi reiða seingina upp til vallaran?<br>Ása | Hvat bjóðaði vallarin Ásu, um hon vildi sova við honum?<br>*Silkiserk, møttul og krúnu* |
| Hvat hugsaði Ása, tá ið hon sá møttulin, serkin og krúnuna?<br>*At systirin átti tað* | Hvør segði við Torkil, at vallarin hevði dripið Katrina?<br>Ása | Hvat hendi við vallaranum?<br>*Hann varð brendur* | Kráka situr á…?<br>*steini* |
| Hvat hakkar krákan í?<br>*beini* | Hvat var tað triðja í "Kráka situr á steini"?<br>*Ein røvari á tingi* | Hvat vóru kvæði av fyrstan tíð brúkt til?<br>*At greiða frá søgum* | Hvussu nógvir sveinar skuldu á skógin at brenna bál?<br>*Tveir* |
| Hvussu nógvar hestar loysti Katrin?<br>Tveir | Hvør saðlaði hestin hjá Katrini?<br>*Katrin sjálv* | Nær lakkar omma Ludvík paradís?<br>*Tá abbi fer at keypa rís* | Hvat ger Buss Óli við bussarnar?<br>*Selur og keypir teir* |
| Hvussu vorðin er kettan um trýnið?<br>*Reyð* | Hvat ger kettlingurin í "Góðan morgun ketta mín"?<br>*Spælir* | Hvar liggur kettlingurin í "Góðan morgun ketta mín?"<br>*Undir bríkini* | Hvagar skulu Andras Dunna, Rip, Rap og Rup?<br>Í Tivoli |

# Fylgiskjal 3

Pílanæmingurin í miðjuni stýrir ringinum við pílinum.
Hann kann t.d. stýra tempo: skjótt/spakuliga, lívligt/minni, høgt/lágt, rópa/teska vm.



## Dømi



# Fylgiskjal 4: Kekklisti

| Ørindi: | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 | 15 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | |

# Fylgiskjal 5

## Fyrisøgn 1

1. Torkil eigur sær døtur tvær,
leingi á morgni sova tær.

2. Tær sova sær so leingi,
til sól skín á teirra seingir.

3. Tær sova sær so leingi á dag,
til sól skín á teirra seingjarstað.

4. Torkil gongur til búðar,
hann vekir upp døtur prúðar.

5. "Statt upp, Katrin, dóttir mín,
kirkjumaðurin bíðar tín."

## Fyrisøgn 2

6. Katrin setst á seingir,
hon klæðist væl og leingi.

7. Hon fór í ein silkiserk,
níggju moyggja handaverk.

8. Uttanyvir møttulin blá,
gull eftir hvørjum seymi lá.

9. Katrin setst á seingjarstokk,
so fór hon í skarlakssokk.

10. Skarlakssokk og búgvin skógv,
hvítar hendur við herðar tvá.

## Fyrisøgn 1

1. Torkil eigur ___________________ døtur ___________________,

leingi ___________________ morgni ___________________ tær.

2. ___________________ sova sær ___________________ leingi,

til ___________________ skín á ___________________ seingir.

3. Tær sova sær ___________________ leingi á ___________________,

___________________ sól ___________________ á teirra seingjarstað.

4. Torkil ___________________ til búðar,

___________________ vekir upp ___________________ prúðar.

5. “Statt ___________________, Katrin, dóttir ___________________,

kirkjumaðurin ___________________ tín.”

## Fyrisøgn 2

6. Katrin setst___________________seingir,

___________________ klæðist ___________________ ___________________ leingi.

7. Hon ___________________ í ___________________ silkiserk,

___________________ moyggja handaverk.

8. Uttanyvir møttulin ___________________,

gull ___________________ hvørjum ___________________ lá.

9. Katrin ___________________ á seingjarstokk,

___________________ fór ___________________ í skarlakssokk.

10. Skarlakssokk ___________________ búgvin skógv,

hvítar hendur ___________________ herðar ___________________.